Fíggjarnevndin

Norðskála 16 apríl 2024

Viðmerking í samband við uppskot LM-110/2023.

Hugasamband Føroya umboðar bridge (BSF) og talv (TSF) í Føroyum.

Hesi bæði feløg hava fyri mestan partin bert sjálvboðin fólk til ymisku uppgávurnar, ið skulu til fyri at reka virksemið.

Kappingin um sjálvbodna hjálp bara veksur, tí føroyingar eru frálíka óførir i ymiskum ítróttum/leikum. Av tí sama gerast uppgávurnar oftani fleiri, og meiri krevjandi, men fyri somu fólkini.

Tað er kærkomið, at møguleiki er at geva ávísa samsýning - sum er skattafrí - fyri útint arbeiði. Og tá ið talan er um avmarkaða upphædd, meta vit hetta framvegis sum sjálvboðið arbeiði.

Krøvini til ítróttin - óansæð støddd - eru eisini vaksandi, og alt verður dýrari. Tá hjálpir væl, at skattafrí samsýning er møgulig. Ein spard króna, er ein vunnin króna.

Hesin møguleikin hevur verið, og er, ein hjálp til dagligan rakstur og menning.

Vit hava onga meining um, hvørt tilboðið skal víðkast ella ikki; tað mugu okkara fólkavaldu taka støðu til. Vit eru takksom fyri møguleikan, og nýta hann í ávísan mun.

Vinarlig heilsan,

Árni M. Dam formaður í Hugasamband Føroya

Umboðandi:

Talvsamband Føroya

Føroya Bridgesamband